# Vilja varðveita lívið í gomlum húsum

**Tey hjá Thomsen á Tvøroyri hava søkt um at fáa skeinkiloyvi, tí tey ætla at gera pubb á bryggjuni á Tvøroyri fyri at halda lív í gomlu handilshúsunum**

FORNMINNI
*Áki Bertholdsen*

– Skulu vit halda lív í húsunum, er tað neyðugt at finna upp á okkurt.

Handilshúsini hjá Thomsen á Tvøroyri eru eitt ógvuliga væl varðveitt fornminni. Men tað er fyrst og fremst teimum fyri at takka, sum eiga og hava átt handilin.

Men tey hava somuleiðis ásannað fyri langari tíð síðani, at sum so nógvir aðrir smáir handlar kring landið, hava eisini tey tapt kappingina við tær stóru handilsketurnar og tí er virksemið í gamla handlinum hjá Thomsen alsamt minkað og matvørur eru at kalla ongar at fáa longur, tó at tey enn hava alt møguligt annað at selja, sum vanligt.

– Fyri at ráð til at varðveita húsini, er tað neyðugt hjá okkum at hava okkurt virksemi í teimum, sum kastar nakað av sær og í løtuni tað ger handilin ikki nóg stóran mun í løtuni, sigur Anna Kirstin Thomsen.

Tí hevur hevur hon tí fingið hugskotið til at at endurreisa ein gamlan tátt í handilsvirkinum hjá teimum gomlu Thomsen monnunum og tað er at hava skeinkistovu.

Tey hava søkt um skeinkiloyvi við tí endamáli at gera eina hugnaliga havnarpubb í einum av teimum gomlu, søguligu handilshúsunum hjá Thomsen.

Men tað nyttaði lítið, tí svarið frá myndugleikunum í Havn, er, at øll skeinkiloyviskvotan í Suðuroy er uppi og at tað verða ikki latin fleiri loyvi.



*Ímillum alt tað gamla, tey hjá Thomsen hava varðveitt, eru hesir báðir kranarnir. Tann stóru verður hildin at vera ein ølkrani, hin minni er ein vínkrani. Teir blivu slignir inn í tunnurnar, so varð klárt skrúva frá og at lata renna*



*Her vísir Anna Kirstin Thomsen okkum tað seinasta skeinkiloyvi, sum varð skrivað við hond. Tað er frá 1906, men árið eftir hevur fútin fingið skrivimaskinu, tí skeinkiloyvi, sum tey fingu í 1907. er skrivað við maskin*

## Grammir at keypa

Handilin hjá Thomsen hevði skeinkiloyvi frá 1860, heilt til fyrst í hesi øldini, tá ið bannið fyri brennivínshandli kom í gildi.

Og tá ið tey herfyri aftur søktu um skeinkiloyvi, sendu tey til stuttleikar tvítøk av tí elsta og tí nýggjasta av teimum gomlu skeinkiloyvunum við og bóðu um at fáa tey endurnýggjað, men tað var so ikki nóg mikið til at fáa loyvismyndugleikan at ganga teimum á møti.

Tað sæst á loyvunum, at í 1960 kostaði eitt skeinkiloyvi 120 ríkisdálar og í 1906 kostaði tað 200 krónur.

Men skeinkiloyvini siga eisini eina aðra søgu. Skeinkiloyvið, sum handilin fekk í 1906, er skrivað við hond, men tá ið fútin skrivar teimum skeinkiloyvið aftur í 1907, hevur hann fingið skrivimaskinu, tí tað er skrivað við maskin.

Men tær gomlu bøkurnar vísa eisini, at mangan var rættiligt lív í brennivínshandlinum á Tvøroyri. Soleiðis ber til at lesa, at tað serliga var í átjanhundrað og sekstiárunum, at nógv brennivín fór um diskin hjá Thomsen.

Men grovastu dagarnar, tey vita um, er vikan frá 14. til 20 juni í 1865, tí bara hesar sjey dagarnar seldu tey heilar 720 pottar av brennivíni. Ein pottur er áleið ein litur.

Hetta vóru hetlendskir og skotskir fiskimenn, sum keyptu stórt inn undir seg, tí heima hjá teimum var brennivínssølan ikki frí.

Hjá Thomsen siga tey, at yvirhøvur vóru hetlendingar og skotar grammir at keypa brennivín, tí tað kom mangan fyri, at skip haðani løgdu inn á Tvøroyri eftir loknan túr at keypa brennivín heim við- og sum tað sæst, var tað ikki smávegis, teir keyptu.

Tað sæst eisini, at tey hava ikki havt sørt av úrvali av brennivíni, tey hava havt bæði akvavitt, konjakk, rom, umframt kirsjuberjavín og annað vín, so har var eitt sindur av hvørjum at fáa.

whazzzup!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Durita Holm, Granada í Spania, durita75@hotmail.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Tann arabiski arvurin í Spania

Blindir biddarar hava altíð havt tað gott í Granada, tí orðatakið her sigur, at ringasti straffur, ið eitt menniskja kann líða, er at vera blindur í vakra Granada, tískil fáa tey blindu altíð onkra olmissu.

Vit búgva ikki í sjálvum Granada, men 8 km. uttanfyri í eini lítlari bygd sum eitur Monachil, og sum liggur 900 metrar yvir havinum. Harvið er bygdin eitt av portrunum til tey nógvi støðini yvir 3000 metrar høgu Sierra Nevada fjøllini.

Teir seinastu mánaðirnar havi eg brúkt til at seta meg inn í søguna hjá Iberisku hálvoynni, og tað sum er undrunarvert, er, at Iberiska hálvoyggin altíð hevur havt eina heilt øðrvísi søgu enn restin av Evropa.

Í 1986 kom Spania uppí EF, tað førdi sjálvandi við sær, at Spania tey seinastu 16 árini við ágrýtni hevur roynt at gerast meir líkt restini av Evropa, ikki bara búskaparliga og politiskt, men eisini mentunarliga.

Um man er 2 vikur við strondina onkustaðni í Spania, er kanska ringt at síggja, at Spania er so øðrvísi, ja sjálvt inni í landinum tekur tað tíð áðrenn man sær, at her er bæði hugsunarháttur og liviháttur øðrvísi. 16 ár í EF megna ikki at viska nógv, nógv hundrað ár av øðrvísi hugsunarhátti út.

Tað sum fyrst og fremst ger spanska søgu so áhugaverda, er tann arabiska innrásin ár 711 okkara tíðarrokning. Hetta var ikki bara ein lítil innrás í nøkur fá ár, nei, alt Spania var merkt av henni og tað seinasta muslimska kongaríkið fall ikki fyrr enn í 1492, tá Isabella og Ferdinand tóku Granada, sum tá hevði verið muslimskt í 800 ár.

Tann arabiska innrásin hevur í stóran mun merkt Spanska søgu heilt til í dag. Arabarar-nir megnaðu ongantíð at taka útnyrðings hornið av Iberisku hálvoynni, Galicia og Asturia, og hagani byrjaði tann 800 ára langi bardagin fyri at vinna landið aftur frá teimum vantrúgvandi. Tey 800 árini verða í spanskari søgu nevnd "la reconðista", tað vóru ár sum samlaðu Spania til eitt ríki, og sum løgdu dentin á heilagt kríggj.

Í 1480, tá bara Granada var eftir á muslimskum hondum, var tíðin komin til at stovna inkvisitiónina og harvið fullføra tað heilaga verkið. Inkvisitiónin (forhoyr og pining av fólki sum katólska kirkjan helt vera trúvillingar), var ikki einastandandi fyri Spania, men tað er tað hinvegin, at hon vardi heilt til 1820, tá restin av Evropa longu var liðug við upplýsingartíðina.

Arvurin frá muslimunum í Spania er ein søga, sum elvdi til eina sterka, egna katólisismu og eitt sterkari og longri giftarmál millum stat og kirkju enn nakra aðrastaðni í Evropa, eitt giftarmál sum sjálvandi merkti, at tí fría tankanum og upplýsing ikki varð lív lagað í Spania. Alt saman góður gróðrarbotnur fyri einræði hjá Franco (1939-1973), sum gav kirkjuni ein týðandi leiklut, og har onki trúarfrælsi var.

Tað er sostatt ikki bara vakurleikin sum ger Granada so áhugaverdan, men líka nógv, at tá man gongur runt í býnum, kennur man, hvussu spanska søgan andar einum oman eftir nakkanum. Á eini stórari høvd mitt í býnum liggur tað kempistóra Alhambra, eitt arabiskt palads og borg. Nógvastaðni í byggisniðnum sær man hendan arabiska arvin lið um lið við tað ser katólska, til dømis tann stóra katedralin sum Isabella og Ferdinand lótu byggja, fyri so dyggiliga at vísa, hvør ið nú ráddi fyri borgum.

Inni í miðbýnum í Granada er lætt at halda, at Spania nú er eins og eitthvørt annað Vesturevropeiskt land. Fólk ganga í seinasta móta við "shopping" posum og drekka coca cola, men man nýtist bara at ferðast eini 3 km longur út, so sær man meir enn so múldjór við vogni ella byrðum, og stórar geitaflokkar, sum hirðin rekur tvørturum stórar vegir við nógvari ferðslu.

Spania-kennarar tosa um Spania sum landið við teimum stóru kontrastunum. Nakrar eru eyðsýndar, aðrar eru við fyrsta eygnabrá verri at fáa eyga á. Slíkt er áhugavert og ein avbjóðing - eg havi nógv at gleða meg til her í Spania!

# ítróttur

Nr. 196 • leygardagur • 12. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Lagið av tí besta í føroyska hópinum



**Tað tykist sum føroysku landsliðsleikararnir gleða seg til dystin í dag, nú teir aftur skulu í altjóða elding**

LITAVA-FØROYAR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**KAUNAS:** Føroyska fótbóltslandsliðið skal í dag altjóða eldin aftur, tá S. Darius & S. Gireno leikvøllurin í Kaunas verður karmur um dystin móti Litava.

Undan hesum dystinum eru Føroyar ájavnar við Skotland á øðrum plássinum í bólkinum við einum stigi. Litava, sum tapti 2-0 í sínum fyrsta dysti og Ísland, sum enn ikki hevur spælt, eru aftan fyri Føroyar.

Hvørt tað skal eydnast føroyska liðnum at halda fast um sessin somikið ovarlaga á stigatalvuni, er sjálvandi óvist, men tað tykist í hvussu so er soleiðis, at tað er hetta, sum leikararnir hava í kvittanunum. Og tað er so fyrsta fortreytin fyri einum góðum úrsliti.

### Gott lag

At døma eftir venjingunum, so er einki at ivast í, at lagið í landsliðshópinum er framúr. Meðan smáspøl av ymsum slag vóru á skránni undir hósdagsvenjingini, hoyrdust láturin mangan runga, tá onkur framdi mistak, ella um ein finta av onkrum slag eydnaðist. Látur, sum tó á ongan hátt skal skiljast soleiðis, at leikarar taka lætt upp á uppgávuna, men heldur sum eitt mát fyri, hvussu samanhaldið í hópinum er. Eitt samanhald, sum kanska kann gera, at menn geva seg tey tvey ella trý prosentini eyka fyri hvørjum øðrum, tá dysturin er á skránni.

Í Litava er annars ikki so nógv at hoyra um landsdystin. Á ítróttarliga økinum stendur fótbólturin her í skugganum av kurvabóltinum, har landið telist millum tey fremstu í heiminum, og eitt nú hevur bronsumerki í OL at vísa á.

Hetta tykist tó á ongan hátt at nerva føroysku leikararnar. Kanska er tað heldur hinvegin ein lætti, at venjingarnar mest sum bara verða fylgdar av føroysku pressuni, og at friðurin kring fyrireikingarnar tí er munandi størri, enn hann vanliga er, tá leikt verður uttanlands.



*At døma eftir venjingunum , so er einki at ivast í, at lagið í landsliðshópinum er framúr, og at menninir vilja geva seg tey tvey ella trý prosentini eyka fyri hvønn annan, tá dysturin er í gongd*

### Liðið

Enn hava venjingarnar hjá føroyska liðnum givið lítlar ábendingar um, hvussu liðið møguliga fer at síggja út leygardagin. Henrik Larsen hevur hesa ferð gjørt lítið og einki burtur úr sonevndu skabelón-venjingunum, har spælskipanin hjá liðnum skal venjast. Kanska eisini tí landsliðsvenjarin hevur meira í hyggju at fáa spæligleðina fram í leikarunum, nú teir allar flestu standa við endan av einum longum og strævnum kappingarári.

Tað er hinvegin eingin loyna, at talan neyvan verður um tær stóru broytingarnar á liðnum, sammett við dystin móti Skotlandi. Øssur Hansen er komin inn í hópin, og hann fær helst pláss í vinstru síðu, har Hjalgrím Elttør annars tóktist at hava tikið yvir. Annars tykjast einastu ivamálini vera Jákup á Borg og Pól Thorsteinsson, sum vit nevndu í fríggjadagsútgáuvni, men hósdagin tóktust teir báðir vera somikið væl fyri, at teir allar helst fara at spæla við.

Tað merkir, at liðið til dystin leygardagin helst fer at síggja soleiðis út; Í málinum verður Jens Martin Knudsen. Pól Thorsteinsson og Jens Kristian Hansen verða á báðum bakkunumj, og miðverjar verða Óli Johannesen og Jón Rói Jacobsen. Á miðvøllinum verða so úr høgru Jákup á Borg, Julian Johnsson, Fróði Benjaminsen og Øssur Hansen, og so verða tað teir báðir, John Petersen og Christian Høgni Jacobsen, sum manna báðar álopssessirnar.

**Litava**

Málverjar
Gintarus Stauce, Fostiras Athen (GRI)
Sydranus Karcemarskas, Dynamo Moskva (RUS)

Útileikarar

| | |
|---|---|
| Aurelius Skarbalius | Brøndby IF (DAN) |
| Adrius Skerla | Dunfermline Athletic (SKO) |
| Marius Stankevicius | Brescia Calcio (ITA) |
| Deividas Semberas | CSCA Moskva (RUS) |
| Dainius Gleveckas | Shakhter Donetsk UKR) |
| Rolandas Dziaukstas | Saturn Ramen (RUS) |
| Ignas Dedura | Skonto Riga (LET) |
| Raimondas Zutautas | Makkabi Haifa (ÍSR) |
| Saulius Mikalajunas | Fakel Voronezh (RUS) |
| Tomas Razanauskas | Akratitos Athen (GRI) |
| Deividas Cesnaukas | Dynamo Moskva (RUS) |
| Nerijus Barasa | Krylya Svetov Samara (RUS) |
| Edgaras Jankauskas | Benfica Lissabon (POR) |
| Robertas Poskus | Krylya Svetov Samara (RUS) |
| Arturas Fomenko | Rostselmash Rostov (RUS) |
| Mindaugas Gardzijauskas | Ekranas Kaunas (LIT) |

**Føroyar**

Málverjar

| | |
|---|---|
| Jens Martin Knudsen | NSÍ |
| Jákup Mikkelsen | Molde BK |

Útileikarar

| | |
|---|---|
| Óli Johannesen | TB |
| Jóhannis Joensen | HB |
| Jón Rói Jacobsen | HB |
| Andrew av Fløtum | HB |
| Rógvi Jacobsen | HB |
| Jens Kristian Hansen | B36 |
| Julian Johnsson | B36 |
| John Petersen | B36 |
| Jákup á Borg | B36 |
| Øssur Hansen | B68 |
| Hans Fró_i Hansen | B68 |
| Fró_i Benjaminsen | B68 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ |
| Pól Thorsteinsson | NSÍ |
| Helgi L. Petersen | NSÍ |
| Christian Høgni Jacobsen | Vejle |

## Ballack er sjúkur

Vandi er nú fyri, at størsta stjørnan á týska landsliðnum ikki verður við, tá Føroyar koma á vitjan í Hannover mikudagin.

Michael Ballack hevur tey bæði seinnu árini ment seg til at vera avgjørt besti leikarin í Týsklandi, men tá Týskarar fríggjakvøldið spældu dyst móti Bosnia-Hersegovina, var miðvallarin úr Bayern München ikki á vøllinum.

Orsøkin var tann, at Ballack lá í seingini við krími, og í løtuni er óvist, hvørt hann verður førur fyri at spæla, tá dysturin móti Føroyum er á skránni. Í týskum miðlum verður roknað við, at um Ballack ikki spælir, verður tað ístaðin Jens Jeremies, sum fær sentrala leiklutin á vøllinum.

**-jm**